Meistarakokkurin Bo Bech:

# Eg eri eingin sjónvarpsstjør



- Nei, eg eri avgjørt eingin harður hundur. Tú hevur sjálvur sæð meg her í kvøld, so eg tími ikki at argumentera fyri tí. Og um tú ikki trýr mær, so kanst tú bara tosa við starvsfólkið, sigur Bo Bech og tekur um tænaran Helenu Jacobsen

Mynd: Aksel Joensen



**– Eg síggi ikki meg sjálvan sum eina sjónvarpsstjørnu. Mín uppgáva er einans at motivera, geva íblástur og ráð til matstovur, sum á einhvønn hátt hava rent seg fastar. Eg kann vera amboðið, men tær mugu sjálvar megna at lyfta seg upp á eitt hægri støði, segði meistarakokkurin Bo Bech við Sosialin**

MEISTARAKOKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Vit hava nevnt tað áður, men kunnu endurtaka tað einaferð enn: Tú heldur ikki uppat at undrast yvir, hvussu líkatil flestu sonevndu stjørnur í veruleikanum eru.

Nú kann tað væl vera, at Bo Bech ikki er heimsins størsta sjónvarpsstjørna, og ikki beinleiðis kann sammeta seg við Jamie Oliver – men hann er hóast alt vorðin landskendur um alt Danmark, og allarhelst um alt Føroya land eisini. Og kortini prátaði hann við umboð Sosialsins sum um vit høvdu kenst í fleiri ár.

– Hugskotið aftan fyri sendingarnar er, at vit skulu fara út og royna at hjálpa matstovum, sum á ein ella annan hátt hava tað hart. Antin tað so er á leiðarastøði, kokkum, ið vanta íblástur ella mati, ið eingin eigur at bjóða hundum, sigur Bo Bech.

Á Rio Bravo fingu bæði starvsfólk og Bo Bech sjálvur sína sak fyri. Og eitt tað fyrsta, hann gjørdi, var at fara »á vestfallið« við hópin av pulvuri, ið matstovan hevði liggjandi.

– Ja, tað gjørdi eg. Maturin, ið matstovan serveraði, var nevniliga fyri tað mesta bara pulvur, sigur Bo Bech við Sosialin.

### Ringasta eg havi roynt

Góðska hevur alt at siga fyri ein meistarakokk sum Bo Bech. Tí kann tað als ikki koma upp á tal at nýta erstatningspulvur at gera mat av.

– Eg skal ikki fjala útyvir nakað. Maturin her er tann ringasti eg enn havi roynt av teimum níggju matstøðunum, ið vit higartil hava gjørt sendingar um, sigur ein ógvuliga bersøgin Bo Bech.

Púra logiskt er tí at hugsa, at stóð so illa til, var Rio Bravo uttan iva tann matstovan, har møguleikarnir fyri eini betring vóru teir størstu.

Men Bo Bech leggur dent á, at hann á ongan hátt er ein harður hundur, sum vit annars kunnu fáa kenslu av, tá vit síggja lidnu sendingarnar. Har kann hann virka ógvuliga kontantur, tá hann tosar við eigarar, stjórar, kokkar og tænarar.

– Nei, eg eri avgjørt eingin harður hundur. Tú hevur sjálvur sæð meg her í kvøld, so eg tími ikki at argumentera fyri tí. Og um tú ikki trýr mær, so kanst tú bara tosa við starvsfólkið, sigur Bo Bech.

Og fyri líkasum at undirstrika hetta, tekur hann um Helenu Jacobsen, sum er høvuðstænari á Rio Bravo, og spyr hana, um hann er farin órímiliga hart fram.

### Loysn, ikki trupulleikar

– Eg motiveri fólk. Og eg haldi, at orsøkin til, at eg til tíðir í sendingunum kann virka sum harður hundur er, at eg megni at »trýsta á røttu knapparnar«, sigur Bo Bech víðari.

Mest sum alla tíðina stendur Bo og fylgir við kokkinum, sum stríðist yvir komfýrinum, meðan hann skal tilgera fleiri sløg av mati. Bo stendur róligur og gevur ráð, og viðhvørt fer hann innar um og gevur eina hjálpandi hond. So fer hann yvir aftur um diskin at eygleiða.

– Tað er av alstórum týdningi, ikki at bukka undir. Eg velji at síggja loysnirnar heldur enn trupullekarnar. Hvussu heldur tú, at Alex Ferguson reagerar, um Manchester United er aftanfyri 0-3 í hálvleikinum? Heldur tú, at hann bara klappar leikarunum á ryggin og sigur: Hatta er gott? Nei, hann roynir at motivera teir og eggja teimum til at gera »et godt stykke arbejde« í seinna hálvleiki. Og tað er tað, eg royni at gera, sigur meistarakokkurin.

So tað er týðiligt, at Rio Bravo hevur leikt fyrra hálvleik, og at vit, myndamaðurin Aksel og eg, nú eru endaðir mitt í hálvleiks »pepp-talk'inum«.

– At vera kokkur, og at gera mat, er ikki nakað, sum tú ger hálvhjartaður. Tú kanst ikki standa og »dilla« yvir matinum. Tú sær sjálvur, at her má tað ganga skjótt fyri seg. Sum kokkur er tú í sving alla tíðina, undirstrikar Bo Bech.

### Tey eru ófør

Vit hava sitið soleiðis fyri, at vit hava sæð beint inn í køkin og harvið kokk og hjálparfólk. Og tey eru sanniliga í sving alla tíðina. Um tað so er tí, at hetta er eitt serligt kvøld við upptøkum til TV3, ella Bo Bech hevur motiverað til tað, skal verða ósagt.

Meistarakokkurin sjálvur er tó ikki í iva:

– Tey hava verið ófør. Jan (Andreasen, kokkurin, red.) og tænararnir hava gjørt eitt risa arbeiði, og eg haldi veruliga, at tey hava vent skeivu gongdini, sigur ein í grundini vælnøgdur Bo Bech.

Hann sigur eisini, at nógv matstøð hava ikki amboðini at lyfta seg sjálvan upp á eitt hægri støði. Og tað kann vera so mangt. Men